# pláss á Viðareiði



*- Her er altíð nóg mikið at gera, sigur 22 ára gamla servitrisan, Ragna Fløhamar, upprunaliga ættað úr Fuglafirði*

*Mynd: Høgni Thomsen*

## Sum lundi á Viðareiði

Á einum hotelli sum hesum á Viðareiði er altíð ójavnt, hvussu nógv fólk vitja inn á gólvið ein slíkan mikudag.

Tað er háárstíð fyri ferðafólk, og hetta uppliva tey sjálvandi eisini við teimum gestunum og vitjandi sum dag og dagliga støkka inn á gólvið.

Talan kann bæði verða um einstaklingar, pør og heilar familjur sum ynskja at steðga nakrar dagar í hesi náttúruvøkru bygdini norðast í Føroyum.

Nógv av hesum ferðafólkunum – eisini føroyingar – hava frætt, at møguleiki er at fáa lunda til døgurða her.

Hetta er kortini ein sannleiki við ávísum modifikasjónum, tí lítið av lunda hevur verið at fingið tey seinastu árini:

- Her mugu vit tíverri siga teimum, at tað er ikki altíð at tað ber til at hava lunda á matarskránni.

- Summi eru heppin, og tey lata sera væl at smakkinum, sigur Ragna.





*Elin Heinesen er hjálparkokkur á hotellinum*

*Mynd: Høgni Thomsen*

**Mær dámar hetta arbeiðið sera væl. Ein hittir nógv fólk – og tja, her er altíð ivaleyst at gera**